# EM liðini sett

**Um páskirnar vóru føroysku bridge-landsliðini á venjingarlegu í Gråsten**

BRIDGE
*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*

Føroysku bridgelandsliðini – opið lið og kvinnulið – vóru í Gråsten í Danmark um páskirnar, har tey spældu við í einari venjingarkapping. Hini londini vóru Danmark, Svøríki og Týskland. Farið var til kappingina við tí fyri eyga at fáa eitt sindur av dystarvenjing móti sterkari mótstøðu — nakað sum undanfarin føroysk landslið altíð hava manglað undan teimum stóru kappingunum. Úrslitini kundu kanska verið eitt sindur betri, vit vunnu bara ein dyst av 12, og tað var sum ikki einaferð vertirnir úr Danmark, ið máttu lúta fyri føroyingum.

Í Gråsten møttu vit avbera stórum blíðskapi. Øll búðu vit privat hjá spælarunum har í býnum. Ikki er óhugsandi, at vit í framtíðini kundu fingið eitt mennandi og varandi vinarsamstarv millum føroyskar bridgespælarar og Gråsten.

Endaligu úrslitini frá altjóða kappingini í Gråsten:

**Opið rað:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Týskland | 106 |
| 2. | Svøríki | 86 |
| 3. | Danmark I | 82 |
| 4. | Danmark II | 79 |
| 5. | Føroyar I | 66 |
| 6. | Føroyar II | 20 |

**Kvinnurað:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Danmark | 63 |
| 2. | Svøríki | 45 |
| 3. | Týskland | 42 |
| 4. | Føroyar | 28 |

## Liðini eru sett

Ferðin í Danmark eydnaðist kanska betri enn væntað. Fyrst og fremst fingu vit høvi at royna okkum móti sterkari leikarum, men vit fingu eisini vant okkum við at spæla við skermum, sledum o.t. Hetta er nakað, sum vit ikki eru von við her heima, men sum verður nýtt í øllum altjóða kappingum – avgjørt ein góð barlast at hava við sær til Italia í summar. Kappingin var nevniliga ein liður í venjingini fram móti EM í Salsomaggiore, Italia.

Beint eftir kappingina varð liðið sett, ið skal leika í opnum rað. Leikararnir eru hesir:

Jóannes Mouritsen, 35 ár, stjóri, býr í Havn. Hevur føroysku landsliðsrekordina fyri leiktar dystir, 52 í tali. Var fyrstu ferð á landsliðnum til NM í Ísland 1988, bara 21 ára gamal. Makkari við Heðin.

Heðin Mouritsen, 35 ár, bilstjóri, býr í Havn, hevur leikt 22 landsdystir.

Bogi Simonsen, 28 ár, sølustjóri, býr í Havn, hevur leikt 33 landsdystir. Makkari við Róa.

Rói á Rógvu Joensen, 32 ár, skrivstovumaður, býr í Havn, hevur leikt 12 landsdystir.

Hans Jacob Petersen, 49 ár, skrivstovumaður, kollfirðingur men býr í Havn, hevur leikt 9 landsdystir. Makkari við Arnbjørn.

Arnbjørn Sivertsen, 45 ár, lærari, býr í Havn, hevur leikt 9 landsdystir.

Kvinnuliðið var longu sett, áðrenn farið var til Danmarkar. Hesar fyrstu kvinnurnar, ið skulu umboða Føroyar í EM kapping, eru:

Jóna Grunnveit, 39 ár, leiðari, hon kemur upprunaliga úr Vík men býr í Havn. Jóna spældi við á kvinnuliðnum í NM í Íslandi í fjør summar, og er nú makkari við Majken.

Majken Johansen, 44 ár, dómari, býr í Danmark. Hetta er fyrstu ferð hon er á landsliðnum.

Arnleyg Eikholm Mikkelsen, 52 ár, sjúkrasystir, býr í Hoyvík. Arnleyg var eisini við í Íslandi í fjør og er makkari við Marjun.

Marjun Restorff, 44 ár, sjúkrasystir, býr í Hoyvík. Veteranurin á kvinnusíðuni, hevur verið við á øllum føroysku kvinnulandsliðum higartil.

Laila Danielsen, 36 ár, sjúkrasystir, býr í Havn, spældi sín fyrsta landsdyst í Gråsten. Makkari við Mariu.

**Eitt løgið spæl: (set board við)**

| | | |
|---|---|---|
| | A987653 | |
| | K106 | |
| | - | |
| | Q87 | |
| 10 | | J |
| AJ874 | | Q9532 |
| AQJ76 | | 1082 |
| 4K | | J543 |
| | KQ42 | |
| | - | |
| | K953 | |
| | A10962 | |

Maria Christiansen, 36 ár, lærari, býr í Havn, fekk eisini sín debut í Gråsten.

Venjari og NPC (ikki spælandi liðskipari) hjá báðum liðunum er Svend Novrup. Hjálparvenjarar hjá ávikavist opna liðnum og kvinnuliðnum eru Finn Ougaard og Mortan Rasmussen.

Í hesum spælinum hendi eitt sindur av hvørjum. Í dystinum millum Føroyar 2 og Týskland gingu meldini soleiðis í lokaðum rúmi:

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| Sivertsen | Buchlev | Petersen | Schillart |
| – | 3sp | pass | 6sp |
| pass | pass | pass | |

Tá Vestan skuldi melda, kundi hann byrja á 7 trininum, og tað hevði loyst seg at offrað í 7hj. Hann fer einans tríggjar niður, sum duplað kostar 500. Nei, valið stóð millum at dupla ella melda pass. Neyvan vóru 6sp meint sum eitt sperrimeld, og var týskarin vorðin óður í høvdinum, straffaði hetta meldið seg helst sjálvt.

Einasta stikk, ið mótspælið fekk var klK. Eystan spældi trumf út. Gott útspæl, men einki hjálpti. Norðan kundi trumfa tríggjar hjartarar á borðinum og síðan dupultklípa í kleyvara, 1430 til Týskland. Í opna rúminum meldaðu og vunnu Árant Berjastein og Magni Jøkladal eisini 6sp. Her duplaði týskarin, vit fingu 1660 og vunnu nøkur IMP uppá ikki at dupla!

Hjá hinum føroyska liðnum, sum í kappingini annars stóð seg betri, gekk minni væl í júst hesum spælinum. Við tað eina borðið gingu meldini soleiðis:

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| J.Mouritsen | Bruun | H.Mouritsen | Blakset |
| – | 2sp | pass | 2ut |
| D | 3sp | pass | 4sp |
| 4ut | pass | 5kl | 5sp |
| D | pass | pass | pass |

Danirnir funnu ikki slemmin. Men eingin kann siga Jóannes ringan fyri at stríðast hart og leingi við Vestan-hondini. 5sp duplaðir +6 gav 1050 til NS, so um nú Rói og Bogi høvdu meldað slemmin, fóru 10 IMP okkara veg. Men teir komu tíverri í 7sp, sum mátti ein niður, og danir fóru avstað við heili 15 IMP´s í hesum spælinum. Kanska fara hesi svingini onkuntíð at falla til okkara fyrimun – hvør veit?

### Til kapping í Bonn

Føroyska landsliðið í opna raðnum er boðið til stóra landsliðskapping í Bonn 7. til 9. mai. FBS hevur tikið av innbjóðingini, og teir, ið fara avstað saman við Svend Novrup, venjara, eru Heðin Mouritsen, Jóannes Mouritsen, Hans Jacob Petersen og Arnbjørn Sivertsen.



*Kvinnulandsliðið er nú úttikið, og tær hava júst verið í Gråsten í Danmark á venjingarlegu*



*Opna liðið, sum eisini tók lut í Gråsten*



# Stoltenberg vildi vera við

**Norðuratlantsbólkurin vil ikki hava tað sitandi á sær, at teir hava borið seg skeivt at móti Thorvaldi Stoltenberg, og teir koma alment fram við skjølum, ið teir meta prógva teirra støðu í málinum**

DIPLOMATI
*Heri á Rógvi*

Norðuratlantsbólkurin er nú komin við skjølum, ið prógva, at Thorvald Stoltenberg ætlaði at luttaka í arbeiðinum hjá bólkinum.

Tað vakti ans, tá Norðuratlantsbólkurin kundi almannakunngera, at teir høvdu fingið sjálvand Thorvald Stoltenberg til at arbeiða fyri seg í einum av teirra fýra kanningarbólkum, ið skal seta fokus ymisk viðurskifti við felags áhuga fyri Føroyar og Grønland.

Tað eru teir tríggir, Lars Emil Johansen, Kuupik Kleist og Tórbjørn Jacobsen, varamaðurfyri Høgna Hoyda, sum manna Norðuratlantsbólkin á Fólkatingi

Tað var 18. mars, at hetta kom fram í tíðindaskrivi frá Norðuratlantsbólkinum. Harfrá verður málið alsamt meira innviklað. Arbeiðið, ið Stoltenberg skal arbeiða saman við Norðuratlantsbólkinum í, snýr seg um hernaðarviðurskifti í Útorði.

Í Sosialinum 6. apríl sigur Thorvald Stoltenberg í samrøðu við blaðið: “at tað hevur als ongantíð verið upp á tal, at hann skal lýsa nakra hernaðarliga støðu hjá Føroyum ella Grønlandi. Hann fer undir ongum umstøðum at blanda seg upp í nakað, sum hevur við støðuna millum Danmark, Føroyar og Grønland at gera, sigur hann.”

Í somu samrøðu sigur Stoltenberg eisini, at hann er keddur av, at hann hevur verið til eina tílíka misskiljing, og hann tók seg úr arbeiðinum beinanvegin, tá hann frætti um støðuni.

– Eg fari ikki at leggja meg út í politisk mál, sum viðvíkja danska kongaríkinum, sigur hann. Og Føroyar vóru als ikki upp á tal yvirhøvur, tá hann tosaði við Lars Emil Johansen, segði Thorvald Stoltenberg við Sosialin.

Hann sigur harumframt, at hann er spurdur um at vera ráðgevi av Lars Emil Johansen, sum er limur og samskipari í Norðuratlantsbólkinum.

Thorvald Stoltenberg er fyrrverandi uttanríkismálaráðharri og verjumálaráðharri í Noregi, fyrrverandi ST-friðarsemingsmaður, fyrrverandi ST-hákommisserur, og núverandi leiðari fyri Reyða Krossi í Noregi.

### Svara aftur

Seint út á fyrrapartin mánadagin 8. april kemur Norðuratlantsbólkurin so við einum tíðindaskrivi. Í hesum skrivinum greiðir bólkurin frá málinum. Teir siga seg harmast um, at Stoltenberg og Preben Wilhjelm, ið ikki kundi vera orsakað av sínari arbeiðsbyrðu, nú ikki vera við í arbeiðinum allíkavæl. Teir undirstrika, at arbeiðið tó heldur áfram av hesari orsøk.

Tað mest áhugaverdi eru skjølini, har Stoltenberg verður biðin um at luttaka, og seinni játtar hesum sama.

Tað stendur klárt í skrivunum, at Thorvald Stoltenberg verður biðin um at luttaka í einum arbeiðsbólki, og tað stendur eins klárt, at hann eisini játtar fyri hesum.

Thorvald Stoltenberg verður í øllum førum ikki við í arbeiðinum hjá Norðuratlantsbólkinum.



*Thorvald Stoltenberg*



Lars-Emil Johansen
Folketinget
Nordatlantiske Gruppe
Christiansborg
DK-1240 KØBENHAVN

Avd: Generalsekretærens stab
Vår ref. AFO Deres ref.

**Vedr. Forespørsel om deltakelse i arbeidsgruppe – Thorvald Sto**

Thorvald Stoltenberg har mottatt Deres brev av 28. februar og hadt r
gjerne vil delta i ovennevnte gruppe.

Ved henvendelser til ham er De velkommen til å benytte hans E-mai
eller formidle post og telefoner via undertegnede.

Tel: + 47 22 05 40 63 ( direkte linje) Mobil: + 47 900 55 516 eller E

Med vennlig hilsen
for Norges Røde Kors

Anne Elise Oppedal
Presidentens personlige sekretær

*Hetta skjalið váttar, at Thorvald Stoltenberg vildi vera við í arbeiðinum hjá Norðuratlantsbólkinum*


## Deildarleiðari til virksemi í Smiðjugerði, Tórshavn

**Virksemi talan er um er: "Vinnuskeið". "Vart verkstað". Og "Umsorganararbeiði"**

**Arbeiðsuppgávurnar**
Arbeiði fevnir um at verða við til at byggja upp eina fjøltotta og spennandi deild teimum arbeiðstarnaðu at frama. Arbeiðsøkið verður at hava um hendi dagligu leiðsluna og virksemi, og at luttaka í vanliga arbeiðnum á deildini.

**Førleikakrøv**
– hevur hóskandi útbúgving.
– hevur samstarvs- og leiðslu evnir, at bjóða ymiskum fakbólkum
– hevur áhuga og kunnleika at arbeiða teimum arbeiðstarnaðu at frama
– hevur innlit í eitt nú galdandi lógir innan økið
– hevur førleika til at útføra og fylgja upp ásett arbeiði, eitt nú handliplanir

**Vit bjóða**
– Spennandi uppbyggingararbeiði, har góðir møguleikar eru fyri ávirkan
– Tætt samstarv við fyristøðufólki
– Sera fjøltátta og sjálvstøðugt arbeiði
– Skeiðmøguleikar

**Løn- og setanartreytir**
Starvið verður sett við beinleiðis tilvísing til fyristøðufólki
Starvið verður at seta 1. juni 2002 ella skjótast tilber.
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, lønarflokkur 6.
Stýrið kann skila sær rætt til ongan at seta.

Áhugaði verða biðin um at seta seg í samband við Kristinu Larsen, fyristøðufólk á tlf. 211135 fyri at fáa útflýggja viðkomandi tilfarð.

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 11. apríl 2002.**
Umsókn saman við prógvið, royndarváttan v.m.skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
Boks 301
110 Tórshavn **brævbjálvin skal viðmerkjast: "umsókn deildarleiðari"**

**"Vinnuskeið"**
*Endamáli við hesi eindini, er at royna og venja arbeiðsevnini hjá tí arbeiðstarnaða, fyri at meta um arbeiðsmøguleikan hjá tí einstaka. At skipa fyri arbeiðsvenjing, við atliti til, at tann arbeiðstarnaði fær arbeiði ella kemur undir útbúgving.*

**"Verkstaði"**
*Endamáli við hesi eindini er at geva arbeiðstarnaðum fólki, sum ikki hava útlit til at klára seg á vanliga arbeiðsmarknaðinum, men sum hava tørv á at vera dagliga virkin á ein hvønn hátt, møguleika fyri at upplærast til at útinna t.d. lættari handverk.*

**"Umsorgararbeiði"**
*Ætla fyritíðarpensionistum, ið hava tørv á at koma saman við øðrum, møguleika fyri at útføra lættari handverk, virksemi ella hugna. Hetta fyri at fáa ein meira innihaldsríkan og stimbrandi dagligdag.*